


*Hvønn dag eftir døgurða arbeiða Leif Berg og Jacklin Durhuus hjá Berg hestum við rørslutarnaðum og fólki við øðrum brekum. Hetta verður serliga gjørt fyri at styrkja um vøddarnar hjá teimum*

# Betri pláss til ross

**Berg hestar eru í ferð við at gera ein nýggjan bygning uppi í Marknagili. Hesin kann m.a. nýtast av ferðafólki, sum koma til landið, men við nýggja bygninginum er eisini møguleiki at skipa fyri ríðilegum og tílíkum fyri børn**

**RÍÐING**

*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tveir hundar komu at taka ímóti okkum, tá vit fóru niðan á Oyggjarvegin at vitja hjá Berg hestum. Tað eru Leif Berg og Jacklin Durhuus, sum hava bæði teir báðar hundarnar og teir mongu hestarnar, og tað er deiliga hugnaligt at koma inn á gólvið í bygninginum, sum tey hava uppi í Marknagili tætt við Hotel Føroyar.

Leif Berg er maðurin, sum byrjaði við Berg hestum, og síðani tey fluttu niðan í Marknagil í 2001, hevur Jacklin Durhuus, sum livir saman við Leif, eisini arbeitt hjá Berg hestum. Har hava tey fleiri hestar gangandi, umframt at tey hava ein bana inni í húsinum, sum er góður at nýta, um veðrið uttan fyri ikki er til vildar.

Tey bæði, Leif og Jacklin, vóru bæði blíð og týð, tá vit vitjaðu tey fyri stuttum, og tey søgdu okkum gleðiliga frá teimum møguleikum, sum Berg hestar hava at bjóða.

### Ymiskir túrar

Møguleikarnir eru mangir, tá tú fert ein túr á rossabaki, og Leif og Jacklin siga eisini, at tey hava fleiri ymiskar møguleikar at bjóða fólki.

– Vit hava allar teir vanligu túrarnar at bjóða her í økinum. Vit gera túrar út í Havnardal, sum vara í á leið tveir tímar, og onkrar aðrar stuttar túrar her í økinum. Vit kunnu eisini gera longri túrar m.a. til Kirkjubøar ella út á Glyvursnes, sum vara tað mesta av einum degi. Tað týdningarmestu fyri gestirnar, sum ætla sær onkran av hesum túrunum, er, at tey tora upp á eitt ross, tí tora tey, so kunnu tey taka allar túrarnar, siga tey bæði.

Afturat hesum túrum hava Berg hestar eisini møguleika at skipa fyri vikuskiftistúrum, men sum skilst á Leif og Jacklin, so vera hesir mest nýttir av fólki við royndum á rossabaki.

### Arbeiða við rørslutarnaðum

Berg hestar skipa eisini fyri ríðiskúla í gjøgnum tað mesta av árinum, og áhugin er rættiliga stórur siga tey. Í løtuni er ríðiskúlin í summarfrí, men í september byrjar undirvísingin aftur, og áhugin er avbera stórur. Longu nú standa fleiri á bíðilista.

Tað eru serliga børn, sum dáma ríðiskúlan so væl, men vaksin hava tó eisini møguleika at tekna seg.

Leif og Jacklin siga annars, at ein stórur partur av teirra arbeiði fer til rørslutarnað og fólk við ymiskum brekum.

– Ja, vit arbeiði nógv við rørslutarnaðum og fólki við øðrum brekum. Hvønn dag aftan á døgurða hava vit tey á vitjan her uppi í Marknagili, og so royna vit at hjálpa teimum, meðan tey ríða ein túr. Hetta er nakað, sum hjálpir teimum sera væl, tí á rossabaki nýta tey so nógvar vøddar, so hetta er góð venjing, siga Leif og Jacklin sum við ein munn.

Broytingar eru annars í væntu hjá Berg hestum, tí í løtuni er ein nýggjur bygningur í gerð uppi í Marknagili. Hesin bygningurin skal m.a. nýtast til ferðavinnuni.

– Vit eru í ferð við at gera ein nýggjan bygning á niðaru síðu, og hesin kann m.a. vera góður at nýta í ferðavinnuni. Ferðafólk kunnu m.a. koma her at fáa ból og bita, og um tey hava hug, so kunnu tey eisini seta hetta saman við ein túr á rossabaki, siga Leif og Jacklin.

– Nýggi bygningurin er rættiliga stórur. Har eru bæði stórur køkur og stór stova á niðaru hædd, og á ovaru hædd vera nøkur rúm, har fólk so kunnu sova. Hesin bygningurin kann tó nýtast til mangt annað enn bara ferðavinnuna. Nú kunnu vit m.a. skipa fyri ríðilegum fyri børn, um áhugin er nóg stórur til tess, siga tey bæði at enda spent á málinum.